

*Annika, Rósa, Helena, Katrin, Annita, Bjørt og Bergtóra eru sjey litfagrar og frískar blómur í tingbukettini*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# n í nútíðina

## ATKVØÐUBÝTI

| | |
|---|---|
| Annika Olsen | 521 |
| Rósa Samuelsen | 314 |
| Helena Dam á Neystabø | 576 |
| Katrin Dahl Jakobsen | 282 |
| Annita á Fríðriksmørk | 616 |
| Bjørt Samuelsen | 547 |
| Bergtóra Høgnadóttir Joensen | 481 |

## FAKTA

**7 kvinnur og 26 menn komu í løgtingið**

Av teim 33 tinglimunum eru 14 nývald. Av teimum 33 eru 7 kvinnur, ella 4 fleiri enn seinast. Kvinnuumboðanin á tingi er nú góð 21 prosent, við 23,5 prosent av atkvøðunum. Heidi Petersen var ikki afturvald, hóast hon persónliga hevði stóra framgongd, og Lisbeth L. Petersen stillaði ikki uppaftur.

tíbetur, sigur Helena Dam á Neystabø, sum er tann, sum hevur sitið longst fyrr, nevniliga í heili 12 ár, frá 1990-2002.

– Ja, eg krympi ofta tærnar, tá eg siti heima og lurti eftir tingvarpinum, skoytir Katrin Dahl Jakobsen uppí.

### Virka um dagin

Mangan hevur verið fýlst á, at tað er so torført at sameina tingarbeiðið við eitt vanligt familjulív. Rokna tær við, at hetta verður øðrvísi nú, spyrja vit. 48 ára gamla Rósa Samuelsen, sum hóast hon ikki hevur havt fast sæti á tingi, er ein royndur politikari í kommunusamanhangi, heldur avgjørt, at tað eigur at lata seg gera at sameina politikk við familjulív.

– Vesturi hjá okkum, í Sandavági, er onki fundarvirksemi um kvøldið. Har hava vit tilvitað lagt allir fundir um dagin, so øll fáa verið við, sigur hon. Og hetta við Sandávági er eisini nakað heilt serligt, tí Rósa er fyrsta umboð úr Sandavági, sum er vald í Løgtingi.

Og Bjørt leggur afturat, at í Finnlandi er tað soleiðis, at allar atkvøðugreiðslur fara fram fyrrapart. So kunnu orðaskiftini verða til langt út á kvøldið, men onki verður avgjørt fyrr enn dagin eftir.

– Eg minnist í øllum førum, tá ið eg sat í tinginum. Tá møtti eg børnunum í hurðini, tí fundirnir byrjaðu ikki fyrr enn klokkan 13.30. Men hetta er tíbetur broytt nú, sigur Katrin Dahl Jakobsen.

Og tær hugleiða um, at saman við ungu pápunum í tinginum fara tær helst at krevja, at arbeiðið verður lagt til rættis, so tað hóskar saman við familjulívinum. Tær halda sostatt eisini, at kvinnur eru øðrvísi, soleiðis at tær fara ikki at sita og hanga í tinginum til onga nyttu.

– Tað hava vit snøgt sagt ikki tíð til, skoyta tær allar uppí, og gera seg til at fara hvør til sítt. Bergtóra, leiðandi við lítlu Karin, heim til abban, sum tíbetur er heima og góður at heita á ein slíkan dag.

## TINGKVINNUR, GJØGNUM TÍÐIRNAR:

Jona Henriksen 1978-80
Karin Kjølbro 1978-90
Jóngerð Purkhús 1988-90
Marita Petersen 1988-98
Lisbeth L. Petersen 1990-
Helena Dam á Neystabø 1990-2002 / 2008-
Maria Hansen 1994-98
Ingeborg Vinther 1994-98
Katrin Dahl Jakobsen 1998-2004 / 2008
Annita á Fríðriksmørk 1998-
Kristina Háfoss 2002-04
Heidi Petersen 2004-2008
Annika Olsen 2008-
Bergtóra Høgnadóttir Joensen 2008-
Bjørt Samuelsen 2008-
Rósa Samuelsen 2008-